# Ein fínur dagur

**Børnini í sætta flokki í Hvalba høvdu ein stuttligan og læruríkan dag í skúlanum í farnu viku. Tey sluppu at gera føroyskan mat burturúr slaktinum, sum nú er fingið til høldar**

MENTANAR-VARÐVEITSLA

*Áki Bertholdsen*

– Hetta hevur verið ein fínur dagur.

Tað vóru ikki tvær meiningar í sætta flokki í Hvalba, tá ið tey eftir loknan dag sótu við búgvið borð niðri í køkini í skúlanum í Hvalba.

Tey høvdu baksast í køkini síðani tíðliga um morgunin og nú fingu tey lønina fyri stríðið. Á borðinum lá bæði blóðmørður, blóðpannukakur, breyð og livur, og í eini grýtu lá rullupylsan undir kóki.

Tá ið hon varð kókað, skuldi hon undir farg, so hana fingu tey ikki smakkað tann dagin, men hon skuldi goymast til eitt hugnakvøld í flokkinum seinni.

Í eini aðrari grýtu stóð súpan úti á.

Alt høvdu børnini gjørt sjálvi. Tey høvdu havt heystardag í skúlanum, har tey skuldu gera ymiskt burturúr slaktinum, sum júst varð fingið til høldar.

Og full semja var um, at hetta var nógv betri enn ein vanligur skúladagur.

At fletta vóru tey so von við. Tað var bara tað eina barnið, har tey ikki høvdu seyð í húsinum, men Eleina hevði ofta sæð tey fletta, so tað var henni als ikki fremmant fyri tað.

Men tað, sum var teimum øllum fremmant, var at taka slaktið upp og at gera burturúr og tað var hetta, tey brúktu hendan dagin til.

Tey gjørdu bæði blóðmørð og blóðpannukakur, livurpostei burturúr eini livur og rullupylsu. Afturvið høvdu tey epli og breyð, sum tey eisini høvdu bakað.



*Fremst á myndini eru tað f.v. Jonhard, Fróði, Eleina og Heidi, sum strevast við at gera blóðmørð. Eleina rørir deiggj, hini trý seyma indur. Aftanfyri standa f.v. Brian, Poul og Kenneth*

*Mynd:Áki Bertholdsen*

Tey høvdu eisini eina síðu, sum tey gjørdu rullupylsu burturúr og síðani kókaðu tey súpan út á beinini.

Flokkurin varð býttur sundur tríggjar bólkar, har hvør bólkur hevði sítt. og tey høvdu eisini hvør sína uppskrift, sum vórðu nærlisnar og fylgdar út í æsir.

Helst kravdi blóðmørðurin og pannukakurnar mest arbeiði. Fyrst skuldi vombin vaskast og klippast sundur. Eleina visti at siga, at tað vóru fýra indur í eini vomb: Hegrið, Jaðrið, Langindur og Stuttindur, men at tað eisini er vanligt at koyra blóð upp í Vinsturin, Keppin og Langan.

Tá ið vombin varð vaskað og klipt, vórðu indrini seymað og so varð deiggið gjørt klárt, indrini fylt hálv og so út á at kóka í tveir tímar.

Tey allarflestu í flokkinum eru drongir, og sjálvt tað vanliga ikki eru drongir, sum fáast við slíkt, má sigast, at huginum at royna nakað nýtt bilti onki og arbeiðslagið varð stak gott.

Yvirhøvur tóktist tað at vera sera stórur áhugi fyri innløgu í flokkinum, tí tað allarmesta prátið var um, veðrar og lomb, seyð og slakt og tað, sum hartil hoyrir.......



*Frá vinstru eru tað Jón og Trýgvi sum røra deiggj til blóðmørð. Aftanfyri stendur Jóhan Eli*

*Mynd:Áki Bertholdsen*

whazzzup!!!

Forrige Næste Svar Svar alle Videresend Flag Udskriv Rediger Slet Ombryd igen Udkast

**TELDUBRÆVIÐ**

Frá: Maria Chun Petersen, mariap@kampsax.dtu.dk
Til: turid@sosialurin.fo
Evni: Vikuskifti

# Fólkatingsvalið

Nú stendur so fólkatingsval fyri durunum, og býurin er longur avtaglaður við plakatum. Bløð koma við postinum og politikarar eru á gøtuni og handa út faldarar, rósur og mín sann eisini mat til tey heimleysu. Eingin endi sær út til at verða, hvar markið gongur. Spurningurin er so, hvar vit útisetar, lesandi eru í øllum hesum hurlivasanum. Eg havi altíð sæð tað sum eina sjálvfylgju at fara á val. Ein vinkona spurdi meg so herfyri, um eg ætlaði mær á val, og eg svaraði »sjálvandi, fert tú ikki?« Svarið var tó ikki, sum eg hevði væntað, tí hon helt seg sum lesandi føroying ikki at vilja blanda seg í donsk viðurskifti, at hon hevði sum so einki at gera á valinum. Tað fekk meg at hugsa, um flestu lesandi føroyingar hugsa soleiðis, ella um vit sum góðir borgarar í landinum fara á val. Eg havi hug at geva henni rætt í ikki at fara á val, tí eg eri føroyingur, komi frá eini aðrari tjóð. Eg átti als ikki at havt valrætt til fólkatingið um rætt var. Íslendingar, norðmenn, sviar og allir aðrir útlendingar, sum eru í Danmark hava ikki valrætt, bert vit føroyingar og grønlendingar. Hugsar tú gjølla um tað, so verða vit veruliga roknað sum danskarar í tí løtu vit flyta til Danmarkar. Tað einasta sum skilur okkum og ein vanliga danskan lesandi, er føroyafrádrátturin. Og tað eru enntá fleiri lesandi sum av eini ella aðrari orsøk ikki fáa føroyafrádráttin, eru tey so í roynd og veru danskarar? Eg spyrji bara. Jú meira eg hugsi um tað, jú minni hug og rætt haldi eg meg hava at fara á fólkatingsval 20. novembur. Fleiri danir hava eisini undrast á, at eg sum føroyingur havi valrætt, spyrja hvussu tað ber til, tí eg eri jú føroyingur! Og tað kenst eisini rættiliga løgið at kunna fara á val í tveimum londum, tí sum lesandi hava vit jú rætt at atkvøða til løgtingsvalið eisini. Um vit so hyggja at hvørji aðalmálini eru hjá stríðandi flokkunum, so er spurningurin um vit veruliga hava nakað at gera á valinum. Útlendingar, ella innvandrarar og betri eldrarøkt eru nøkur av høvuðsmálunum. Og hví skulu vit føroyingar búgvandi í Danmark siga nakað um aðrar útlendingar í Danmark? Tað er kanska eitt sindur av lívsins speisemi, at vit sum føroyingar kunnu vera við at avgera um lógirnar fyri útlendingar skulu strammast upp. Tí sjálvt um vit ikki føla okkum sum danskarar, men sum føroyingar ikki heimaverðandi í Danmark, føla okkum sum útlendingar, so eru vit ikki útlendingar á pappírinum, rætt og slætt eru vit danskarar á pappírinum.

Eg sá í eini tíðindasending herfyri, at eitt enskt blað hevði gjørt eina heilt serliga útgávu um Danmark. Tosað var eisini við ritstjóran og hann lovprísaði Danmark, dønum og serliga danska matinum. Eitt sum hann framhevjaði var, at Danmark var so kompakt, alt var so tætt, um sæð var burtur frá Grønlandi! Eg meini so við, í mínari verð hevur Grønland ongantíð verið Danmark og ei Føroyar, men er tað soleiðis útlendingar síggja okkum?

Eg hoyri ferð eftir ferð føroyingar, sum hava verið og ferðast kring heimin siga, at tey hava sagt fremmandafólki, at tey vóru úr Danmark, tí tey orkaðu/tímdu ikki at greiða frá, hvørjar Føroyar vóru, tí eingin visti tað kortini. Einki løgið í tí um hetta er hugsanin, at man orkar ikki at greiða frá, hvar Føroyar eru, tað er léttari at siga Danmark, tí øll vita hvar Danmark er. Tað eru sjálvandi fleiri, sum vita hvar Danmark er, enn hvar Føroyar eru, men hvat so? Nógvir amerikanarar halda, at Keypmannahavn er høvuðsstaðurin í Svøríki og undrast á, at tosað verður so nógv ymisk mál í Evropa. Eg havi seinastu tíðina eisini tosað nógv við skiftisnæmingar úr øllum heiminum á skúlanum, og tey skiltu væl, at eg segði meg vera føroying og ikki danskara. Og sjálvandi sigi eg, at eg eri føroyingur, uttan mun til hvussu ofta eg noyðist at siga, hvørjar Føroyar eru, og hvar tær liggja. Sum ein úr Hollandi segði, mítt land er eisini sera lítið og tað eru nógv sum ikki kenna tað, men eg eri enn úr Hollandi.

Jú meira eg hugsi um støðuna, jú meiri verði eg sannførd um, at eg eigi ikki at fara á fólkatingsval 20. novembur í Danmark. Einasta rætta, eftir míni metan, var um eg kundi fara á fólkatingsval í Føroyum, og harvið valt eina føroyska rødd, ið eg føli hevði umboðað meg betur, sum lesandi føroying.


